




# Takk fyri heilsanina, Ingeborg!



Val X

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu og valevni Javnaðarfloksins

Tað er vorðið sum lortaspannir, Ingeborg Vinther stoytir niður yvir Javnaðarflokkin í hesum døgum. Fyrst eitt skendskt álop á Helenu Dam á Neystabø og nú enn eitt av sama slag á undirritaða, Heðin Mortensen. Sjálv vendi hon Javnaðarflokkinum bakið á sinni, so tí er ilt at skilja, at hennara hjarta nú skal banka so hart fyri flokkinum.

Eftir øllum at døma er tað ikki lukkuligt at vera fyri, tá Ingeborg Vinther ikki fær sín vilja. Nú fáir dagar eru til løgtingsvalið, hevur hon sett seg sjálva sum yvirdómara fyri, hvør skal kunna stilla upp fyri Javnaðarflokkin og ikki. Og synd er at siga, at undirritaði fær ta fagrastu viðferðina, nú sinnið er farið við Ingeborg!

Í lesarabrøvum stoytir hon lortaspannir niður yvir útvald valevni hjá Javnaðarflokkinum. Talan er um lortaspannir, ið eru so grovar og skendskar, at tær kanska ikki áttu nakað aftursvar uppiborið. Men Ingeborg fer ov langt – alt ov langt – so tí kenni eg meg noyddan at skriva hesar reglur.

Fyrst sendi hon Helenu Dam á Neystabø eina heilsan, ið var so undir alt lágmark, at tú ikki skuldi trúð, at hetta var oddafiskurin í størsta arbeiðarafelag her á landi, ið skrivaði. Og nú eri tað so eg, ið standi fyri tørni. Hvør veruliga orsøkin til hesi sniðálop er, dugi eg ikki at siga, tí skitnu heilsanir hennara eru so fullar av mótsagnum, at tað ber næstan ikki til at skilja, hvørji ørindi hennara eru.

Í fyrra lesarabrævi sínum spyr hon, um trúvirðið hjá Javnaðarflokkinum er í lagi, og í tí seinna spyr hon, um Javnaðarflokkurin vil leggja navn til politikkin hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra. Báðir spurningarnir kunnu stutt svarast játtandi, tí tað liggja floksdemokratiskar mannagongdir aftanfyri, at bæði Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen eru uppstillað fyri Javnaðarflokkin.

**Endurtaka ikki feilir**

Trupulleikin er bara, at hetta tykjast ikki vera veruligu ørindini hjá Ingeborg Vinther, tí bæði á reglunum – og millum tær – sæst ein so ógvuslig sinnisrørsla, at eg ivist ikki í, at Ingeborg sjálv hevur gloymt, at hon á sinni vendi Javnaðarflokkinum bakið. Nú hon kemur við sínum lortaspannum, minnir hon mest um ein dampketil, sum hevur ein ikki-virkandi yvirtrýstsventil.

Ingeborg vil vera við, at rættartrygdin hjá vanliga borgaranum er illa vard við tí politikki, Heðin Mortensen stendur fyri. Hetta grundar hon á, at hon ikki fær sín vilja, sum er at Tórshavnar kommuna skal veita henni og felag hennara sersømdir at byggja, sum teimum lystir, hóast málið er so sera einfalt: Byggisamtyktin heimilar ikki tí bygging, Ingeborg vil fremja, og tað er so tað!

Í lesarabrævinum vísir hon á, at Tórshavnar kommuna hevur givið byggiloyvi, sum tað ikki átti, og at kommunan tí var dømd at rinda endurgjald. Ætlar hon veruliga, at kommunan skal endurtaka eitt slíkt mistak, so endurgjald skal rindast enn eina ferð? Nei, sjálvandi fer Tórshavnar kommuna ikki at endurtaka ein feil, sum hon enntá hevur fingið dóm fyri. Tí fær Ingeborg heldur ikki sín vilja!

**Gjøgnumholað lortaspann**

At hon so førir fram, at borgarstjórin skal hava lovað bæði eitt og annað, gjøgnumholar hennara lortaspann beinanvegin, tí tað er ikki upp til borgarstjóran at skriva út byggiloyvi. Tí tekur ein faklig umsiting sær av, og henda umsiting letur síðani byggi- og býarskipanarnevndini eitt tilmæli at taka støðu til, og síðani verður handlað út frá tí. At vísa á aðrar mannagongdir, er at tilleggja borgarstjóranum meira vald, enn hann hevur.

Orsøkin til, at Føroya Arbeiðarafelag ikki er sloppið at byggja út, sum tað kundi hugsað sær, er heilt einfalt, tí fakliga umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur mælt frá, og tí byggi- og býarskipanarnevndin hevur tikið tað til eftirtektar. Her er við øðrum orðum gingið eftir bókini, so her er einki hjá Ingeborg at koma eftir. Slett einki!

Ikki er nóg mikið hjá Ingeborg Vinther, at Heðin Mortensen skal standa fyri skotum, tí hon rør eisini framundir, at formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini, Jógvan Arge, skal vera ógegniður, tí hann er granni hjá Føroya Arbeiðarafelag… Hon nevnir tó einki um, at hon enntá hevur kært hetta til landsstýrið fyri trimum árum síðani, men fekk ikki viðhald!

**Øvundar okkara eldru**

Av øðrum, ið sær út til at vera farið við yvirtrýstinum í dampketlinum hjá Ingeborg Vinther, er hennara stóri skelkur av, at í grannalagnum hjá Føroya Arbeiðarafelag hevur Tórshavnar kommuna bygt út gomlu marinustøðina, so 24 búpláss fingust til nøkur av okkara eldru, ið høvdu tørv á at koma á ellis- og røktarheim.

Ófatiligt, at Ingeborg Vinther skal fáa so ilt av, at kommunan hevur gjørt nakað fyri at betra um korini hjá okkara eldru borgarum! Hetta átti ikki at fingið øði í eina gamla javnaðarsál, sum Ingeborg letst at vera, tí júst frami á eldraøkinum er nakað, ið stendur Javnaðarflokkinum sera nær. Hevði ikki trúð, at Ingeborg skuldi sett spurnartekin við hetta – av øllum!

Men soleiðis er tað bara, tá tú letur sinnið fara við tær og ikki hevur tamarhald á tær sjálvum. At útbreiða sína øvund inn á okkara eldru á henda hátt, er besta prógvið fyri, at Ingeborg Vinther missir stýringina, tá hon ikki fær sín vilja og tá hon ikki fær sínar sersømdir – fram um onnur.

Góða Ingeborg! Eg takki fyri heilsanina, men harmist um, at tú skuldi søkka so lágt!

# Vit eru ikki til smartar loysnir



Val X

KRISTIAN MAGNUSSEN
Løgtingsmaður og valevni

Javnaðarflokkurin hevur gingið á odda og hevur tryggjað, at vit hava fingið eina savnandi og berandi loysn í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Tí eiga vit nú, við einum sterkum Javnaðarflokki á odda, at nýta alla samfelagsorkuna til at menna fólksins vælferð.

Javnaðarflokkurin hevur sett sær ítøkilig mál fyri tey komandi 4 árini. Mál, ið snúgva seg um at betra um korini hjá teimum eldru, familjuni, teimum við skerdum møguleikum, ungdóminum, heilsuverkinum, skúlaverkinum og verkafólki. Vit vilja framhaldandi skapa karmar fyri fjølbroytni og dynamikki í vinnulívinum.

Vit taka ongi óráð fyri, men vilja menna tjóðina við støði í okkara hugsjón. Okkara solidariski politikkur tryggjar okkum øllum og komandi ættarligum framtíðina.

# Miðflokkurin er verji teirra, íð bera brek



Val X

CHARLOTTA Á VÁLI OLSEN
Miðflokkurin

Miðflokkurin hevur sett sær sum mál at verja tey, íð bera brek í landi okkara. Tað er syrgiligt at síggja, at júst hesin parturin av okkara týdningarmiklu samfelagsborgarum, er so illa hagreiddur sum hann er. Tá ið tað viðvíkur hesum partinum av kæru landsmonnum okkara, so kunnu tit trygt líta á Miðflokkin. Miðflokkurin stendur við givin lyfti.

MIÐFLOKKURIN setir sær fyri, at tørvurin á sambýlum til brekað SKAL nøktast.

MIÐFLOKKURIN vil at tørvurin á vardum íbúðum til brekað SKAL NØKTAST.

MIÐFLOKKURIN vil at avvarandi at brekaðum SKULU fáa nógv meiri hjálp.

MIÐFLOKKURIN vil at foreldur at brekaðum SKULU hava nógv betri sømdir.

MIÐFLOKKURIN vil, at lítli Petur sleppur heim aftur, og at ONGIN, íð ber brek verður sendur av landinum, eins og hann bleiv!

# Skattatrýstið eigur at fara niður



Val X

FRÍÐTÓR DEBES
Miðflokkurin – X við lista H

Tað er eingin ivi um, at skattatrýstið ídag er alt ov høgt – serliga fyri tær lágu- og miðal lønirnar. Tá skattavaldið hevur fingið sítt, pluss onnur lógarásett gjøld, so er ikki nógv eftir hjá vanliga føroyinginum. Hetta haldi eg er skeivt – og her eigur broyting at koma í – ongantíð ov skjótt.

Tað eigur og skal loysa seg væl og virðiliga at arbeiða. Ídag er skatturin so mikið høgur, at ofta spyr ein seg sjálvan, um tað loysir seg at arbeiða – tá tað almenna fer avstað við alt ov nógvum peningi, av hvørjari vunnari krónu. Hetta eigur ikki at vera so.

Eg eri av tí fatan, at vit eiga at lata skattatrýstið minka so líðandi – ár fyri ár – til vit eru komin niður á eitt hóskandi støði. Passaligt kundi verið, at latið trýstið minka 1% árliga nøkur ár fram.

So sigur tú kanska, men hvar skulu vit fáa írestandi peningin frá, ið so kemur at mangla í inntøkum hjá landinum? Góður spurningur. Eg trúgvi tí, at við at latið fólkið rátt yvir einum størri parti av sínum hart vunnu pengum, so hevði tað sæst aftur í dynamikkinum í samfelagnum – av tí at fólkið hevði meiri pening at keypt fyri, umvalt fyri o.s.fr. So eg eri ikki bangin fyri, at peningurin bleiv burtur. Her høvdu fólk kunnað sett pening til síðis - pluss havt ráð til átrokandi ting...

Hvussu ber tað til, at vit eru so bangin fyri at slaka uppá skattin? Hvat óttast vit? Tað einasta, ið vit fáa burtur úr hesum høga skattatrýsti er – at ymsu feløgini krevja hægri løn – fyri at meira kann verða eftir til einstaka limin – við tí úrsliti, at lønin fer upp, prísurin á ymsu vørunum fer upp (sum vit hava sæð síðsta árið) og okkara kappingarføri við útheimin gerst bara verri og verri. Hetta er ein ónd ringrás, ið eigur at steðgast. Tað, ið telur fyri hin einstaka borgaran – er hvat hann/hon hevur eftir – aftan á skatt. Hetta er tað, tey skulu liva av.